## – Eingin vinardystur

Spania vann leygarkvøldið 2-1 á Argentina í einum vinardysti, men eftir dystin helt Barcelona-spælarin, Andrés Iniesta, at talan ikki var um nakran vinardyst, tí til tað var dysturin alt ov harður. – Hetta var eingin vinardystur, tí har vóru nógvar ljótar hendingar, og eg hugsaði mest um, at eg ikki mátti blíva skaddur, segði Iniesta, sum tó var fegin um, at Spania vann dystin og at hann slapp heilskalaður burtur úr tí. – Tað er ein góð kensla at hava vunnið – serliga, nú vit fyrireika okkum til HM-endaspælið, segði hann.



## Nani helst til Italia

Gongst, sum dagblaðið Manchester Evening News veit at siga, so endar portugisin í Manchester United, Nani, í italskum fótbólti í januar mánaði, tí bæði AC Milan og Juventus skulu hava víst honum áhuga. Nani hevur havt ilt við at fingið spælitíð í Manchester United, og fyri kortum gjørdi hann ikki støðuna frægari, tá hann alment gramdi seg um, at hann ikki fekk kjansin frá venjaranum, Sir Alex Ferguson. Sum skilst, er Manchester United ikki avvísandi fyri tilboðum, tí lítið bendir á, at Nani er partur av serligum framtíðarætlanum í felagnum.

# SÍ, Mjølnir og Fleyr koyra á

**Trý tey fremstu liðini á stigatalvuni tykjast eisini vera tey trý, ið koma at røkka longst í Eikliguni hjá kvinnum. Við reinum 3-0 sigrum staðfestu SÍ, Mjølnir og Fleyr í øllum førum sína støðu í gjár**




Hilmar Jan Hansen

Landskappingin hjá kvinnunum sær framvegis soleiðis út, at SÍ er greitt oddalið, meðan Mjølnir og Fleyr royna at renna aftaná. SÍ hevur enn einki stig sett til, men vísir styrki ferð eftir ferð. Mjølnir hevur bara mist ímóti oddaliðnum, og Fleyr sær eisini út til at vera við at koma í gongd.

### SÍ-TB 3-0

**(25-13, 25-23, 25-11)**

Hóast TB fyri viku síðani gjørdi eitt hál norðanfjørðs, so megnaði liðið ikki at endurtaka tað, tá vitjað varð í Sørvági sunnudagin. Tað hevði helst eisini verið ov nógv at kravt av unga TB-liðnum, tí SÍ hevur verið tryggasta og besta liðið higartil – og var tað eisini sunnudagin.

Samanumtikið gjørdist talan um ein tryggan SÍ-sigur, har TB tó slapp at spæla eitt sindur meira við í øðrum setti. Munurin var tá mest, at SÍ hevði hug at slakka eitt sindur av, og tí fekk TB meira burturúr, enn í hinum báðum settunum.

Sigurin er tann fimti á rað hjá SÍ-kvinnunum, ið mugu metast sum stórfavorittar til bæði lands- og steypakappingina. Og hóast TB mátti lúta í Sørvági, sær liðið tó út til at hava dygdir, ið røkka til eitt pláss í miðjuni.



Mjølnir hevði ein lættan dyst ímóti KÍF, tá allar sluppu at spæla, og framvegis eiga klaksvíkskvinnur næstbesta kvinnuliðið í Eikliguni
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### Mjølnir-KÍF 3-0

**(25-17, 25-10, 25-11)**

Av hinum liðunum er Mjølnir tað, ið hevur bestan hugin at bjóða av – og helst eisini hevur dygdirnar til tað. Mjølnir hevur bara tapt fyri SÍ, men vunnið rest, og tá KÍF vitjaði í Badmintonhøllini í Klaksvík sunnudagin, gjørdist úrslitið tað, ið væntast kundi.

Unga KÍF-liðið stríðist so væl, sum tað kann, men ímóti Mjølnir rakk tað ikki til so nógv, hóast kvinnurnar úr Kollafirði kundu fegnast um, at tær fingu fleiri stig í hvørjum setti, enn tær hava fingið í fleiri av hinum dystunum.

Mjølnir vann dystin lættliga, og heldur enn at fara eftir einum so knúsandi sigri, sum gjørligt, var pláss givið fyri útskiftingum, so allir spælararnir sluppu at royna seg. Men sjálvt uttan allarsterkastu ketuna var Mjølnir sannførandi og vann trygt.

### ÍF-Fleyr 0-3

**(21-25, 18-25, 16-25)**

Fleyr liggur aftan fyri hini bæði fremstu og lúrir – tvey stig aftan fyri Mjølnir og fýra stig aftan fyri SÍ. Sunnudagin var ÍF á skránni á Kambsdali, men tað gjørdist ikki ein dystur, ið gav Fleyr óneyðugar trupulleikar, og talan gjørdist um ein tryggan sigur.

Gjøgnum allan dystin var Fleyr greitt betra liðið, meðan spælið hjá ÍF versnaði, so hvørt sum sjálvsálitið fór. Eftir at hava fylgt hampuliga væl við í fyrsta setti, mistu tær hjá ÍF mótið og duttu bara longur og longur niður.

Meðan stór ábyrgd tykist hvíla á nøkrum fáum hjá ÍF, er breiddin hjá Fleyr eisini ein munur á liðunum, og í gjár sást, at Fleyr hevði fleiri streingir at spæla uppá.

**ÍF-Fleyr 0-3 (22-25, 19-25, 22-25):**

## ÍF spælir ikki liðugt

Illa hevur gingist í hond hjá fuglfirðingum, sum síðsta kappingarár vunnu greipuna. Nú eru fleiri av teimum royndu burturi, og tí er tað eitt ungt og evnaríkt lið, ið verður spælt saman. Men úrslitini lata bíða eftir sær, og í so máta var heimadysturin ímóti Fleyr í gjár einki undantak.

Fuglfirðingar vóru á odda í bæði fyrsta og triðja setti, men megnaðu ikki at halda fast við leiðsluna, sum Fleyr tók aftur báðar ferðir. Hetta hevur eisini verið trupulleikin hjá ÍF í fleiri dystum, tí liðið megnar at fáa nógv stig í hvørjum setti, men eigur enn til góðar at vinna eitt sett!

Í gjár vóru tað hinvegin royndirnar, ið gjørdu munin hjá Fleyr, ið hevur fleiri landsliðsspælarar, ið eru til reiðar at traðka í karakter, tá avgerandi løturnar eru í dystunum. Tí vann havnarfelagið ein 3-0 sigur, ið sær greiðari út á pappírinum, enn hann var á vøllinum.

**hil**